Starvslýsing

Stuðulstænastan

## Stuðul til 4 brúkarar í Norðurstreymoy

Stuðulstænastan søkir eftir einum stuðulsfólki til 4 brúkarar í Norðurstreymoy, at byrja so skjótt sum møguligt.

Arbeiðsuppgávurnar eru saman við brúkarunum at leggja ætlanir fyri gerandisdagin, at fara við teimum til ymisk tiltøk, at stuðla teimum í gerandisligum uppgávum heima, og soleiðis verða við til at geva brúkarunum ein virknan gerandisdag.

Arbeiðstíðin er tilsamans 20 tímar um vikuna. Møguleiki er at fáa fleiri tímar seinni, um áhugi er fyri tí.

Stuðularnir í Norðurstreymoy fara at arbeiða í einum toymi. Har hittast vit regluliga til starvsfólkafund. Samarbeiðið verður við toymini úr sama øki, sum eru Vágarnar, Sandoy og Suðuroy.

**Førleikakrøv**
Umsøkjarar við útbúgving innanfyri almanna og heilsuøkið ella námsfrøðingar hava fyrimun til starvið.

**Setanarviðurskifti**
Lønar- og setanarviðurskifti eru eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag. Starvsfólk, sum ikki hava fakligari útbúgving, verða lønt sum hjálparfólk eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Pædagogfelagið.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Jónvør Petersen samskipara tlf. 554083

**Umsókn**
Umsókn skal sendast til:

Stuðuldtænastan
Stílað : Regin Johansen
Argjavegur 26
Postboks 3037
110 Tórshavn

**Umsóknarfreist: 6. juni 2008.**

**Les meira á www.naerverk.fo/leys størv**

Nærverkið kemur út til borgaran at veita tænastur, ið fevna um eitt nú stuðul, tilboð til borgarar við serligum tørvi og tænastur til barnafamiljur og eldri. Nærverkið er sjálvstøðugur stovnur undir Almanna- og heilsumálaráðnum. Umframt Meginskrivstovuna, ið hevur yvirskipaðu leiðsluna, eru fýra deildir: Heimatænastan, Trivnaðartænastan, Stuðulstænastan og Barnatænastan. Nærverkið leggur áherðslu á nærleika, umsorgan og professionalismu í øllum lutum. Umleið 1400 fólk starvast í Nærverkinum.

NÆRVERKIÐ

Meginskrivstovan · Postsmoga 3037 · 110 Tórshavn · Tel 36 00 00 · Faks 36 00 01 · meginskrivstovan@naerverk.fo

www.naerverk.fo

Sjúkrakassin er stongdur vegna feriu frá **27. mai 08 til 10. juni 08,** báðir dagar íroknaðir.

**Sjúkrakassi Vestmanna Læknadømi**

i
Sosialurin




STØRV Á LANDSSJÚKRAHÚSINUM

## Deildarleiðari til intensivu deild G1

Starvið sum deildarleiðari á intensivari deild er leyst at søkja til setan 1. juli 2008 ella eftir avtalu. Talan er um eitt fulltíðarstarv.

Deildin hevur pláss fyri 5 intensivum sjúklingum og 5 plássum í viðrakningin og hevur tætt samstarv við bráðfeingismóttøku/skaðastovu og kommunulæknaskipanina.

Møguligar broytingar kunna verða í samband við ætlaðar umleggingar á deplinum.

**Arbeiðsuppgávur í høvuðsheitum á intensivu deildini**
Deildarleiðarin hevur fakliga, fyrisitingarliga og fíggjarliga ábyrgd av dagligu leiðsluni á deildini og vísir til leiðandi sjúkrarøktarfrøðing á Bráðdeplinum. Skal tryggja góðskuna av sjúkrarøktini og starvsfólkamenning, at deildin virkar eftir virðisgrundarlagnum hjá Landssjúkrahúsinum og hava neyvt samstarv við fleiri ymiskar fakbólkar og deildir.

**Vit bjóða**
- eitt áhugavert og avbjóðandi starv
- eitt dynamiskt og fjølbroytt arbeiðsumhvørvi
- positivt tvørfakligt samstarv
- ávirkan á fakliga menning

**Vit ynskja at tú ert áhugað/ur í**
- at menna sjúkrarøktina á deildini saman við kompetentum starvsfólki
- at virka fyri góðum arbeiðsumhvørvi, sjúkrarøktarfakliga og tvørfakliga
- at skipa fyri góðari upplæring av nýggjum starvsfólki
- at skipa fyri fakligari menning og útbúgving av røktarstarvsfólki
- at verða við til at implementera THS (talgilda heilsuskipan)

**Krøv til umsøkjaran**
- prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur
- royndir og møguliga útbúgving innan intensiva økið
- góð samstarvsevni og góðar royndir við tvørfakligum samstarvi
- áhuga í fakligari menning av røktarstarvsfólki
- kann arbeiða sjálvstøðugt, kreativt og hava visiónir
- telduførleika á brúkarastøði

Tað er ynskiligt, at tú hevur royndir innan leiðslu og/ella leiðsluútbúgving

Starvslýsing og fleiri upplýsingar fáast við at venda sær til Margit Stórá, deildarleiðari G1, telefon 304500, lokal 5811 ella til Nainu Túgvustein, leiðandi sjúkrarøktarfrøðing, lokal 5102, lsnaitu@ls.fo

**Umsóknarfreistin er 30. mai 2008 kl. 12.00**

## Onnur leys størv á Landssjúkrahúsinum
(sí meira á www.lsh.fo)

**Sjúkrarøktarfrøðingar til Barnadeildina B5**
Umsóknarfreistin er 26. mai 2008 kl. 12.00

**Fysioterapeutur**
Umsóknarfreistin er 26. mai 2008 kl. 12.00

**Hjálparfólk til Journalarkivið**
Umsóknarfreistin er 30. mai 2008 kl. 12.00

**Sjúkrarøktarfrøðingur/ heilsurøktari/læknaskrivari til Sjúklingaskrivstovuna**
Umsóknarfreistin er 30. mai 2008 kl. 12.00

**Læknaskrivari til Med. depilin**
Umsóknarfreistin er 16. juni 2008 kl. 12.00

**Læknaskrivari til Skurðdepilin**
Umsóknarfreistin er 16. juni 2008 kl. 12.00

**Ljósmóðir**
Umsóknarfreistin er 4. juli 2008

**Yvirlækni til Medisinsku deild**
Umsóknarfreistin er 16. juni 2008
Sí meira á www.laegejob.dk

**Fasa III útbúgving í intern medisin**
Umsóknarfreistin er 1. august 2008
Sí meira á www.laegejob.dk

Lønar- og setanartreytir samb. sáttmála millum avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið.
Tað er umsøkjarans ábyrgd at umsóknin er Lønar- og starvsfólkadeildini í hendi, áðrenn freistin er úti.
Skrivlig umsókn við CV, autorisatión, prógvum, skjølum o.l. skal sendast til:
Landssjúkrahúsið, Lønar- og starvsfólkadeildin, FO-100 Tórshavn



**Á Landssjúkrahúsinum**
- er sjúklingurin í miðdeplinum
- eru umleið 200 seingjarpláss
- eru umleið 20 læknafakligar sergreinir
- eru psykiskar og somatiskar seingjardeildir
- eru umleið 800 fólk í starvi í roykfríum umhvørvi
- er virðiligur samverutóni óansæð kyn, húðalit, politiska-, átrúnaðarliga- ella seksuella orientering

Landssjúkrahúsið J.C. Svabosgøta 100 Tórshavn Tel: +298 30 45 00 Fax: +298 31 42 53 lsh@lsh.fo www.lsh.fo